# Áhugaverd oyggjauppgerð



OYGGJABRAK

*Seinast liðið hittust, endaði við javnleiki. Men hesuferð skal oyggjauppgerðin avgerast*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**LØGMANSSTEYPIÐ Fyri aðru ferð innanfyri smáar tvær vikur hittast ÍF og B68. Bæði liðini vóru væl nøgd við landskappingarúrtøkuna eftir trý umfør, men seinast kiksaði tað hjá teimum og tað skal rættast upp á í steypakappingini**

Rólant Waag Dam

Bæði ÍF og B68 trakkaðu í størri og minni mun við síðurnar av síðsta vikuskiftið. Í báðum førum gjørdu liðini tað í móti einum spildurnýggjum liði í deildini.

Hjá B68 var tað heilt galið, tí toftamenn kunnu upp á ongan máta góðtaka eitt tap í móti einum uppflytara – og als ikki góðtaka mátan, liðið tapti upp á í móti FC Suðuroy.

Bill McLeod Jacobsen og hansara menn eru eisini fullgreiðir um, at einasti mátin at reisa seg, er við at vinna á ÍF og spæla seg víðari í steypakappingini.

Til at greiða henda setning hava toftamenn optimalar fortreytir. Undan seinasta dysti lógu bæði Keita og Pól Jóhannus Justinussen sjúkir, men hesa vikuna hava allir mans vant við fullari ferð.

Hjá fuglfirðingum var úrslitið seinasta umfar heldur ikki nøktandi. Á heimavølli spældi ÍF seg fram til javnleik og eitt stig móti uppflytarunum B71. Aftrat hesum noyddist Høgni Zachariassen skaddur av vøllinum. Ein vøddaskaði heldur honum frá at spæla bólt næstu tvær til tríggjar vikurnar.

So er tað Frank Poulsen, sum ikki hevur spælt nakað serligt í ár. Hann hevur havt trupulleikar við einum brotnum føti, men er byrjaður at venja spakuliga aftur. Kortini verður hann ikki við sunnudagin.

Sunnudagin eru tað eisini smáar tvær vikur síðani, at liðini bæði spældu móti hvør øðrum seinast. Tá var talan um landskappingardyst, B68 hevði heimavøll og gjørdist sigursharri.

Nú spæla liðini fjórðingsfinalu í kappingini um Løgmanssteypið. Hesin dystur verður spældur í Fuglafirði, har ÍF hvørki hevur tapt ella vunnið í ár.

rolant@sosialurin.fo

## Arsenal Føroyar aðalfund

**Føroyska fjepparafelagið hjá Arsenal hevur í morgin aðalfund í Bridgehúsinum í Havn, og aftaná verður hugt at dystinum ímóti Manchester City.**

Arsenal Føroyar hevur nú trý ár á baki sum alment og viðurkent Arsenal-fjepparafelag í Føroyum, og umfram at skipa fyri felags tiltøkum bæði burturi og heima, tá Arsenal-dystir eru, hevur felagið eisini egna heimasíðu, har lesast kann um dystir, spælarasøgur og annað.

Hóast møguleikin fyri enska meistaraheitið hetta kappingarárið tykist fokin, savnast fjepparanir trúliga um felagið, og í morgin, 24. apríl, klokkan 15 verður árligi aðalfundur felagsins í Bridgehúsinum í Havn.

Aðalfundurin verður hildin sambært viðtøkurnar, og aftaná verður so farið oman í Café Natúr at hyggja at dystinum ímóti Manchester City, sum byrjar klokkan 17.30. Bæði skrásettir og nýggir fjepparar eru vælkomnir, sigur felagið.

## Dystir um vikuskiftið

| Løgmanssteypið | | Dystur: | Dómari: |
|---|---|---|---|
| Sunnudagin | 25/4 | FC Hoyvík-B36 | Alex Troleis |
| Sunnudagin | 25/4 | FC Suðuroy-EB/Streymur | Ransin Djurhuus |
| Sunnudagin | 25/4 | Víkingur-AB | Rúni Gaardbo |
| Sunnudagin | 25/4 | ÍF-B68 | Dagfinn Olsen |

| 1. deild menn | | Dystur: | Dómari: |
|---|---|---|---|
| Leygardagin | 24/4 | HB-07 Vestur | Birgir Sondum |
| Leygardagin | 24/4 | TB-KÍ | Ransin Djurhuus |
| Leygardagin | 24/4 | FC Hoyvík-B68 | Bent Tommy Linklett |
| Leygardagin | 24/4 | AB-Víkingur | Dia Lamhauge |
| Leygardagin | 24/4 | EB/Streymur-NSÍ | Rói Jacobsen |

| 2. deild menn | | Dystur: | Dómari: |
|---|---|---|---|
| Leygardagin | 24/4 | B36-Víkingur | Eugon Voda |
| Leygardagin | 24/4 | Skála-07 Vestur | Pætur Albinus |
| Leygardagin | 24/4 | FC Suðuroy-TB | Lars Muller |
| Leygardagin | 24/4 | ÍF-FC Hoyvík | Birgir Joensen |
| Leygardagin | 24/4 | KÍ-MB | Bárður Mortensen |

| Unglingar | | Dystur: | Dómari: |
|---|---|---|---|
| Sunnudagin | 25/4 | NSÍ-HB | Ragnar Niclasen |
| Sunnudagin | 25/4 | B36-Skála | Jón K. Petersen |
| Sunnudagin | 25/4 | KÍ-EB/Streymur | Dia Lamhauge |
| Sunnudagin | 25/4 | 07 Vestur-B68 | Johan P. Michelsen |
| Sunnudagin | 25/4 | AB-ÍF | Sólfinn Gudmundsson |

| 1. deild kvinnur | | Dystur: | Dómari: |
|---|---|---|---|
| Sunnudagin | 25/4 | Víkingur-MB | Verner Hentze |
| Sunnudagin | 25/4 | Skála-AB | Elsa Andreasen |
| Sunnudagin | 25/4 | EB/Streymur-KÍ | Kári J. Á Høvdanum |

### Føroyska Vodafonedeildin

| Nr. | Lið | Dystir | Vunni | Javnt | Tapt | + Mál | - Mál | +/- | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 4 | 3 | 1 | 0 | 10 | 4 | +6 | 10 |
| 2 | Víkingur | 4 | 2 | 2 | 0 | 9 | 5 | +4 | 8 |
| 3 | HB | 4 | 2 | 2 | 0 | 8 | 6 | +2 | 8 |
| 4 | B68 | 4 | 2 | 0 | 2 | 8 | 6 | +2 | 6 |
| 5 | EB/Streymur | 4 | 1 | 2 | 1 | 6 | 5 | +1 | 5 |
| 6 | FC Suðuroy | 4 | 1 | 2 | 1 | 8 | 8 | 0 | 5 |
| 7 | ÍF | 4 | 1 | 2 | 1 | 4 | 4 | 0 | 5 |
| 8 | AB | 4 | 0 | 2 | 2 | 9 | 12 | -3 | 2 |
| 9 | B71 | 4 | 0 | 2 | 2 | 4 | 12 | -8 | 2 |
| 10 | NSÍ | 4 | 0 | 1 | 3 | 3 | 7 | -4 | 1 |

### Føroyska 1. Deild menn

| Nr. | Lið | Dystir | Vunni | Javnt | Tapt | + Mál | - Mál | +/- | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 3 | 2 | 1 | 0 | 8 | 2 | +6 | 7 |
| 2 | Víkingur II | 3 | 2 | 1 | 0 | 9 | 4 | +5 | 7 |
| 3 | 07 Vestur | 3 | 2 | 1 | 0 | 4 | 2 | +2 | 7 |
| 4 | HB II | 3 | 2 | 0 | 1 | 7 | 6 | +1 | 6 |
| 5 | TB | 3 | 1 | 1 | 1 | 5 | 4 | +1 | 4 |
| 6 | EB/Streymur II | 3 | 1 | 1 | 1 | 3 | 4 | -1 | 4 |
| 7 | NSÍ II | 3 | 0 | 3 | 0 | 3 | 3 | 0 | 3 |
| 8 | FC Hoyvík | 3 | 0 | 1 | 2 | 3 | 5 | -2 | 1 |
| 9 | B68 II | 3 | 0 | 1 | 2 | 2 | 8 | -6 | 1 |
| 10 | AB II | 3 | 0 | 0 | 3 | 1 | 7 | -6 | 0 |

### Føroyska 1. Deild kvinnur

| Nr. | Lið | Dystir | Vunni | Javnt | Tapt | + Mál | - Mál | +/- | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 3 | 3 | 0 | 0 | 19 | 0 | +19 | 9 |
| 2 | AB | 3 | 2 | 0 | 1 | 20 | 3 | +17 | 6 |
| 3 | Skála | 2 | 2 | 0 | 0 | 8 | 3 | +5 | 6 |
| 4 | Víkingur | 3 | 1 | 0 | 2 | 4 | 5 | -1 | 3 |
| 5 | EB/Streymur | 3 | 0 | 1 | 2 | 1 | 10 | -9 | 1 |
| 6 | MB | 4 | 0 | 1 | 3 | 2 | 33 | -31 | 1 |

### Danska SAS-Ligaen

| Nr. | Lið | Dystir | Vunni | Javnt | Tapt | Mál | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FC København | 28 | 17 | 5 | 6 | 50-19 | 56 |
| 2 | OB | 28 | 14 | 8 | 6 | 39-28 | 50 |
| 3 | AaB | 28 | 12 | 8 | 8 | 32-21 | 44 |
| 4 | FC Midtjylland | 28 | 13 | 5 | 10 | 38-38 | 44 |
| 5 | Brøndby IF | 28 | 12 | 6 | 10 | 47-44 | 42 |
| 6 | Esbjerg fB | 28 | 11 | 9 | 8 | 38-37 | 42 |
| 7 | Silkeborg | 28 | 11 | 7 | 10 | 44-39 | 40 |
| 8 | FC Nordsjælland | 28 | 11 | 5 | 12 | 32-33 | 38 |
| 9 | SønderjyskE | 28 | 8 | 8 | 12 | 25-30 | 32 |
| 10 | AGF | 28 | 8 | 8 | 12 | 30-38 | 32 |
| 11 | Randers FC | 28 | 7 | 9 | 12 | 27-37 | 30 |
| 12 | HB Køge | 28 | 2 | 6 | 20 | 25-63 | 12 |

**Føroyskir leikarir:** *Christian Lamhauge Holst (Silkeborg)*